## Broytt í Íslandi

Um vikuskifti vísti ein meiningakanning hjá Gallup, at hevði altingsval verið í Íslandi nú, hevði Sjálfstæðisflokkurin fingið 33 prosent av atkvøðunum, og so stóra undirtøku hevur hann ikki havt síðani fyri búskaparkreppuna. Verandi stjórnarflokkar, Samfylkingin og Vinstri grøn, høvdu fingið ávikavist 25 og 23 prosent. Framsóknarflokkurin hevði fingið 16 prosent, og sostatt høvdu Sjálfstæðisflokkurin og Framsóknarflokkurin fingið 49 prosent og stjórnarflokkarnir 48 prosent, um var altingsval nú, skrivar Mogunblaðið.



## BP stóra bót

Bretska oljufelagið BP skal gjalda 450 milliónir krónur í bót fyri vantandi trygd á einum reinsiverki, sum felagið hevur í amerikanska statinum Texas. Tað er amerikanska arbeiðseftirlitið, sum hevur ásett bótina, ið er tann størsta, sum nakað felag hevur fingið frá eftirlitinum. Eftirlitið sigur, at BP fær bótina, tí felagið hevur ikki ikki bøtt um trygdina á reinsiverkinum eftir eina spreinging fyri fýra árum síðani. Spreingingin kostaði 15 arbeiðsmonnum lívið, og 170 fingu skaða. Leiðslan í BP hevur mótmælt revsingini og vil ikki rinda bótina, skrivar AP.




# Eik væntar 150 milliónir í undirskoti

**Eik samtakið hevur lækkað sína meting fyri 2009 til eitt undirskot á 150 milliónir krónur og hevur økt um ómaksgjøldini við 31 milliónum krónum seinasta ársfjórðing. Bankapakki II gevur tó tryggleika**

ROKNSKAPIR
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Eik Banki hevur áðrenn vikuskiftið kunngjørt roknskapin fyri triðja ársfjórðing. Talan er tó ikki beinleiðis vakran roknskap, sum ger, at bankin verður noyddur at lækka metingina fyri 2009 til undirskot á 150 milliónir krónur, í mun til millum 25 og 75 milliónir krónur í undirskoti, sum metingin ljóðaði áðrenn.

Fyrsta til triðja ársfjórðing hevði Eik samtakið eitt undirskot eftir skatt upp á 100 milliónir krónur, í mun til 33,4 milliónir í undirskoti sama tíðarskeið í fjør. Tí hevur bankin lækkað sína meting fyri 2009 til eitt undirskot á 150 milliónir krónur.

– Fyrst og fremst er tað gott at staðfesta, at inntøkurnar frá rentum og ómaksgjøldum netto eru uppi á aftur sama stigi sum fyri einum ári síðani. Tað er neyðugt. Harnæst kunnu vit staðfesta, at niðurskrivingarnar eru lækkaðar frá 2. til 3. ársfjórðing. Men vit vænta framvegis høgar niðurskrivingar. Og við hybrida kjarnukapitalinum hevur bankin styrkt solvensin upp á eitt nøktandi stig, nú tíðirnar eru turbulentar, sigur forstjórin í Eik Banka, Marner Jacobsen.

### Dýrari at vera kundi

»Bankin hevur styrkt grundleggjandi raksturin í 3. ársfjórðingi, og hann styrknar væntandi eisini í 4. ársfjórðingi«, skrivar bankin í frágreiðingini.

Tá grundleggjandi raksturin er batnaður, merkir hetta tó at tað er vorðið dýrari at vera kundi. Rentu- og ómaksgjøldini øktust soleiðis við 31 milliónum krónum frá 2. til 3. ársfjórðing 2009, og tey eru nú á sama støði sum í 3. ársfjórðingi í 2008. Bankin hevur harnæst við virknaði frá medio oktober hækkað rentumarginalin, serliga á vinnulívsviðskiftum. Samstundis er kostnaðurin til starvsfólk og umsiting í miðal hildin niðri á einum lægri støði enn í 2008.

### Bankapakki II tryggjar

Eik Banki undirskrivaði í gjár eisini avtalu um luttøku í Bankapakka II hjá donsku stjórnini. Harvið styrkist kapitalgrundarlag bankans við hybridum kjarnukapitali á 327,2 milliónum krónum.

Kuponrentan er 10,92 prosent p.a. Tað merkir, at solvensurin hjá móðurbankanum styrkist úr 16,4 prosent í 19,4 prosent, og solvensurin hjá samtakinum fer úr 10,9 prosent upp í 12,9 prosent.

Dótturbankin, Eik Bank Danmark A/S, ið millum annað rekur størsta internetbankan í Danmark, er longu við í Bankapakka II og tók í juni 2009 tilsamans 295,3 milliónir krónur í láni sum hybridur kjarnukapitalur.

– Leiðslan er nøgd við, at virksemið í Eik Bankasamtakinum umvegis Bankapakka II er tryggjað á ein hátt, ið skapar ró og álit, ið eru neyðug í framhaldandi arbeiðinum at skapa svørt tøl á botnlinjuni, sigur Marner Jacobsen, forstjóri í Eik Banka. Bankapakki I og II tyngja úrslit bankans við í minsta lagi 126 milliónum krónum í 2009.

# Søla av gomlum kjøti onga avleiðing



**Brúkaraumboðið ger ikki meira við eitt mál um ov gamalt kjøt, sum varð selt í Føroya Keypssamtøku í Suðuroy. At talan var um ein feil, er frágreiðing nokk, og málið fær onga avleiðing**

BRÚKARAVERND
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Tað var ein feilur í pakkideildini í samband við pakkingina av kjøtinum, hevur Føroya Keypssamtøka boðað Brúkaraumboðnum frá, eftir at Brúkaraumboðið hevði tikið eitt mál upp um gamalt kjøt, sum varð keypt úr frostdiskinum hjá Føroya Keypssamtøku í Suðuroy.

Talan var um kjøt, sum var farið um síðsta søludag tann 7. oktober, og sum var keypt tann 26. oktober í ár.

Føroya Keypssamtøka hevur havt málið til hoyringar, og sigur í svarskrivi, at um rætt varð atborið undir merkingini av vøruni, so var vøran merkt sum frystivøra. Haldførið skuldi ikki verið 1 dagur, men 30 dagar. Malið oksakjøt, sum skal seljast feskt, skal merkjast kølivøra við haldføri í 1 dag og skal ikki seljast aftaná hesa tíðarfreist. Sostatt er talan um ein feil, og Føroya Keypssamtøka hevur lovað, at tað framyvir verður gjørt meira burturúr at kanna vørurnar, áðrenn tær verða lagdar fram.

»Vit harmast um mistakið og vilja royna at sleppa undan feilum av hesum slagi framyvir«, sigur Føroya Keypssamtøka.

Í Danmark og í Svøríki hevur sonn gøla verið í seinastuni um júst umpakking og sølu av alt ov gomlum kjøti. Har er avdúkað, at slaktarar umpakka kjøtið og seta nýtt haldførismerki á pakkarnar, umframt at teir, heilt lógliga, drýggja feskt kjøt heilt út til 50 dagar eftir at tað fyrstu ferð hevur verið í søludiskinum.

Har hava eisini verið lovaðir batar, men serfrøðingar vilja vera við, at enn er bara toppurin av umfatandi svikinum komin til sjóndar.

Brúkaraumboðið ger ikki meira við føroyska málið um gamalt kjøt.